




SÓKNAST VERÐUR EFTIR STARVSFÓLKI TIL STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

Søkt verður bæði eftir fólki til føst størv og eftir avloysarum.

NÁTTARVAKTIR
Søkt verður eftir álítandi hjálparfólkum at vera náttarvakt heima hjá fjølbrekaðum børnum. Arbeiðsstaðurin er heima hjá børnunum, og umráðandi er tí, at náttarvaktirnar eru búgvin fólk, ið duga at laga seg til og at virða umstøðurnar í heiminum.

STARVSFÓLK TIL YMSAR STUÐULSUPPGÁVUR
Flestu uppgávurnar eru seinnapartar, um kvøldið og í vikuskiftunum. Arbeiðið fevnir í nøkrum førum um at vera við børnum í frítíðini og í øðrum førum um ansing og røkt í heiminum. Einstakar uppgávur eru um morgunin gerandisdagar. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur hjá fleiri børnum.

Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, og tey, ið sett verða, mugu tola broytingar í starvinum.

Størvini verða sett og lønt samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er týsdagin 15. juli 2008 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn og møgulig prógv og viðmæli skulu sendast til: Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Argjaboðagøta 7, 160 Argir.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til stuðulsráðgevarnar á tel 35 35 70.

KREA

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast umleið 100 fólk.

stuðulsfólkaskipanin fyri børn

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

